# **Sex í húsið (“La chambre d´Ami”)**

**Høvundur: Marc Camoletti**

**Á donskum týtt til *”5 til sex”* eftir Claus Weeke**

**Leiksøga**: Leikurin gongur fyri seg í París í heiminum hjá hjúnunum Bernard og Jacqueline, sum bæði liva eitt dupultlív við ávikavist hvør sínum elskarinnu/elskara.

Hetta vikuskiftið hava tey hvør í sínum lagi gjørt avtalur við sína vinkonup/vin, og nógvar ymiskar søgur og lygusøgur verða flættaðar saman. Tað eitur seg, at Jacqueline fer at vitja foreldur síni, sum búgva uttanfyri París, og Bernard verður sendur í arbeiðsørindum til Marseille.

Stovugentan, Loulou, sum er ein sentralur persónur í leikinum skal eftir ætlan fara heim og vitja forleldur síni. Sostatt skuldu húsini í París verið tóm. Men so verður ikki. Loulou broytir ætlan á tokstøðini. Hon vil heldur goyma pengarnar til okkurt betur ogn vendir heim aftur til húsið hjá Bernard og Jacqueline. Tað sama gera Bernard og Jacqueline hvør í sínum lag. Jacqueline vendir heim aftur til ”tóma” húsið við vini sínum Robert, og Bernard vendir heim aftur til ”tóma” húsið við vinkonu síni Brigitte. Burtur úr hesum spyrst ein øgiligur rúðuleiki.

Leikurin er ein farsa burturav, gott undirhald, skemtiligur og spennandi.

Nevnast kann, at Marc Camoletti eisini skrivaði sjónleikin ***”Sex í pyamas”,*** sum Klaksvíkar Sjónleikarafelag spældi í ár 2000.

**Pallmynd**: Bert ein pallmynd. Leikurin er í trimum pørtum.

**Leikarar:**

- **Loulou -** stovugenta
- **Bernard**
- **Jacqueline**
- **Robert**
- **Brigitte**

Aldurin er ikki so neyvur, onkustaðni millum 25 og 45 ár

Leikurin er ein spennandi avbjóðing fyri allir 5 leiklutirnir - lyklaorðið er tempo og neyvleiki.

**Leiktíð**: Umleið 2 - 3 tímar.

***Sjónleikurin er skrásettur í MáF***